HAVSTOVAN

## Assistentur til Havstovuna

Søkt verður eftir assistenti til uppsjóvardeild á Havstovuni at byrja skjótast gjørligt.

**Starvsøkið hjá assistentinum er at:**

- vera við í dagliga arbeiðinum á uppsjóvardeildini, ið m.a. fevnir um at taka lívfrøðiligar royndir og aldursgreina uppsjóvarfisk, og føra ymisk lívfrøðilig dáta á teldu;
- fara við Magnusi Heinasyni ella øðrum skipi at taka royndir av veiðuni, og annars at fara á virkir at taka royndir av veiðuni frá uppsjóvarskipum.

Umsøkjarar við áhuga í havlívfrøði og við royndum í nýtslu av teldu hava fyrimun. Góð evnir at samstarva er ein fortreyt.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til:

**Havstovan**
Nóatún 1, P.O. Box 3051
FO-110 Tórshavn

og skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi **15. februar 2011.**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Arge Jacobsen, teldupost janarge@hav.fo ella Eilif Gaard, stjóra teldupost eilifg@hav.fo, tlf. 353900.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

HAVSTOVAN

## Granskari til Havstovuna

Søkt verður eftir granskara til uppsjóvardeildina á Havstovuni. Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár frá setan (frá 1. mars 2011 til 1. mars 2012).

**Arbeiðsøki hjá granskaranum er m.a. at:**

- kanna útbreiðslu, lívfrøði og vistfrøði hjá uppsjóvarfiski í føroyskum havøki,
- gera stovnsmetingar av uppsjóvarfiski,
- fara við Magnus Heinasyni ella øðrum skipi í sambandi við gransking,
- vera við í vísindaligum verkætlanum í samstarvi við granskingarstovnar í øðrum londum.

Umsøkjarar skulu hava førleika á master stigi innan lívfrøði. Umsøkjarar við royndum í gransking og stovnsmeting av fiski og við innliti í nýtslu av databasum hava fyrimun. Harumframt er neyðugt við góðum førleika í munnligum og skrivligum enskum. Góð evnir at samstarva er ein fortreyt.

Løn sambært sáttmála millum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til:

**Havstovan**
Nóatún 1, P.O. Box 3051
FO-110 Tórshavn

og skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi **15. februar 2011.**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Arge Jacobsen, teldupost janarge@hav.fo ella Eilif Gaard, stjóra, teldupost eilifg@hav.fo, á tlf. 353900. Web: www.hav.fo

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

